# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FÁA GONGD Á SUM SKJÓTAST

Tað vóru sorgarboð, sum frættust fríggjadagin, at Fiskavirking er farin í Skiftirættin. Harvið mistu 800 fólk arbeiði - og harvið lívsgrundarlagið.

Fiskavirking var eitt politiskt projekt frá byrjan og harvið eisini eitt politiskt býtisbarn. Landið hevur nú royndir við at reka fiskavirking og hevur eisini mist nógvar pengar upp á projektið, sum helst var neyðugt tá. Helst kundi hesin truplleikin verið handfarin øðrvísi tá, men vit kunnu so bara taka útgangsstøði í støðuni, sum hon er beint nú.

Og hon er ikki góð hjá teimum, sum nú hava mist síni størv. Men tað er kortini vón fyri framman, tí bæði virki og skip fara í gongd aftur, og vónandi so skjótt sum gjørligt.

Landið fer eftir øllum at døma einki at gera við at endurstovna felagið, og harvið er tað litið upp í hendurnar á vinnuni sjálv at finna útav.

Ein stórur munur á kreppuni í dag og henni í nítiárunum er Arbeiðsloysisskipanin, sum nú hevur nógvar pengar. Tað er ein troyst, at starvsfólkini kunnu koma í hesa skipan beinanvegin, men tað stendur ein stór uppgáva fyri framman hjá fakfeløgunum, sum eisini eiga at lofta sínum limum. Hetta er helst tann størsta avbjóðingin hjá Samtaki.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag nevndi, at landið eigur at traðka til, har tað privata ikki røkkur, og hon helt, at landið tí hevur eina skyldu at vera við í eini endurreisn so ella so.

Tað er púra rætt, sum hon sigur, at vit ikki mugu koma í ta støðu, at virki og skip fara at liggja still í longri tíð. Skiftirættarfundur verður fríggjadagin í næstu viku, og fyri ta tíð hendir valla nakað. So er bara at vóna, at ein endalig loysn kann finnast sum skjótast - og hon verður helst, at virki og skip verða seld hvør sær, tí politiski boðskapurin er púra greiður, at landið fer ikki at keypa.

Ein fyribilsloysn kann sjálvandi verða, at onkur fer at leiga virki og skip fyri at reka tað víðari til ein endalig loysn verður funnin. Tað er óiva ein møguleiki, sum bústjórarnir arbeiða við.



Tað er í øllum førum vist, at fleiri góðar kreftir mugu arbeiða saman í hesum máli, til tess at fáa gongd aftur í virki og skip sum skjótast.

Ein annar trupulleiki, sum kemur í kjalarvørrinum á kreppuni hjá Fiskavirking er, at nógv fólk koma at liva undir fátækramarkinum, sum tó ikki er ásett. Ingeborg Vinther vísir á, at fólk sum hava verið í fiskavirkisskipanini koma nú at fáa eina 30-40 krónur um tíman frá ALS, og tað kann eingin liva fyri.

Her stendur ein stór uppgáva fyri framman hjá politiska myndugleikanum.

**Hetta er helst tann størsta uppgávan hjá Samtaki**

## Er tað »Álvaratos«, Magnussen?



Tað er mikið áhugavert at hoyra kjakið í sendingini Álvaratos í Kringvarpinum fríggjadag. Har viðger panelið ymiskt, sum hevur verið frammi í fjølmiðlunum – og so fáa vit teirra meining um tað.

Fríggjadagin var tað ein grein her á síðu tvey, sum var til viðgerðar. Tað var greinin »Hvar var Kringvarpið«, sum vit skrivaðu, tí vit hildu tað vera eitt sindur løgið, at Kringvarpið ikki var til tiltakið hjá Dugna, tá tey heiðraðu Snorra Brend fyri positivar greinar um fólk við breki.

Vit fara ikki at misteinkja Kringvarpið fyri ikki at dekka tiltakið, tí tað var eitt blaðfólk í Miðlahúsinum, sum varð heiðrað. Tí tað vistu tey ikki. Men løgið var tað kortini, at Kringvarpið als ikki nevndi hesi positivu tíðindini - havandi public service kravið í huga.

Men so er tað Jákup Magnussen, sum ikki kann lata vera við at koma við insinuerandi viðmerkingum. Hesaferð postuleraði hann, at bløðini fáa fleiri milliónir í almennum stuðuli, tí tey eru frítikin fyri MVG. Reint journalistiskt hevði tað sømt seg betur fyri bæði Kringvarpið og Jákup Magnussen, at hann eftirkannaði tað, hann sigur. Minsta kravið má vera, at pástandurin er rættur. Einaferð legði hann Rás2 undir at taka ímóti mutri, og nú er skuldsetingin, at vit ikki gjalda MVG. Føroysku bløðini gjalda fleiri milliónir í MVG um árið! Tað sum Jákup Magnussen hevur misskilt er, at søla av bløðum, eins og bókum, er frítikin fyri MVG. Óbeinleiðis kunnu vit siga, at hetta er stuðul til bløðini - men tað umfatar altso bara søluna av blaðnum, sum í sølubúðini kostar 20 krónur í staðin fyri 25, harav landskassin skuldi havt tær fimm krónurnar.

Annars vóru tað kvinnurnar í sendingini, sum betur dugdu at reflektera og analysera viðurskiftini, enn journalisturin og politisturin gjørdu fríggjdagin. Kanska tí tær hava vinnulívsroyndir og vita, hvat tað er at reka fyrirætning, har pengarnir bara ikki koma av sær sjálvum.

Men stríðið um lýsingarpengarnar, tað heldur fram, hóast Elin Michelsen rullar eygu. Vit í Miðlahúsinum eru í tí vanlukkuligu støðu at skula kappast móti einum heilum landskassa um lýsingarpengarnar, og tað er hvørki rætt, rímuligt ella rættvíst. Tað er so hamrandi órættvíst. Og at politikarar - fyrst og fremst landsstýriskvinnan í mentamálum - ikki eru sína uppgávu vaksin, tað ger bara trupulleikan størri.



**18 milliónir til Saltsilo**

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 26



**Vælkomin umborð**

SONNE SMITH
KJAK Á SÍÐU 28



## Høgni burtur fjórða hvønn fund

Í blaðnum fríggjadagin skrivaðu vit frá Høgna Hoydal, at tað hevur passað so væl hjá honum at røkt bæði størvini sum fólkatingsmaður og løgtingsmaður síðani 15. mars í ár, at tað ikki hevur verið neyðugt at sent boð eftir Páll á Reynatúgvu, sum er fyrsti varamaður hjá Tjóðveldinum á tingi.

Hvat tað so er at »røkja« sítt løgtingsstarv, tað kunna tað vera ymsar meiningar um, men ein partur er vælsaktans at møta á tingfundi.

Av teimum 68 tingfundunum, sum hava verið frá 15. mars til 1. desember í ár hevur Høgni Hoydal verið burturstaddur teir seytjan. Tað er eitt fráveruprosent upp á 25 - og í einum miðnámsskúla hevði tað verið útvísing.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*